

kr., fyri tapið teir koma at líða, av tí tey hava skrætt niður innandura.

– Tá ið vit spyrja í bankanum, um vit kunnu bjóða upp á eini onnur hús, er svarið noktandi. Bankin vil ikki læna okkum pening, fyrr enn hetta málið er loyst. Nú er tað skjótt hálvtannað ár síðan, vit byrjaðu at bjóða uppá húsini. Síðsta ár vónaðu vit, at sleppa inn áðrenn jól. Nú vóna vit at sleppa burturúr hesari marruni áðrenn næstu jól, sigur Unn.

## Ávara onnur

Spurd, hví tey velja at fara í miðlarnar við málinum, greiðir Unn frá, at hon heldur tað vera neyðugt at ávara onnur, og at upplýsa um, hvussu illa staddir keyparar eru.

– Onkustaðni haldi eg tað er forbiðið synd í okkum, tí vit kenna okkum virkuliga reyvrend, sigur Unn og flennir, men verður beinanvegin álvarsom aftur, tá hon heldur fram, at ongin ynskir at standa alment framm sum offur.

– Men hendan søgan, ella gysarin, má forteljast, tí hetta er so langt úti, at tað bara má ávarast harðliga. Vit eru komin so illa fyri av hesum, at vit kunnu onki missa við at fara í Sosialin, sigur hon, og skoytir ilsliga uppí, at í prinsippinum kundi hetta verið ein og hvør meklari og ein og hvør seljari.

– Ein og hvør húsakeypari í Føroyum kann koma út fyri hesum. Tí her eru ov fáar lógir á økinum, keyparin hevur onga trygd, og meklarin – óansæð hvussu álitandi hann tykiskt – hevur eftir øllum at døma onga ábyrgd fyri keyparanum, og kann ikki heftast fyri nakað, sum hann hevur sagt ella gjørt móti keyparanum, sigur hon. Og hon vísir í hesum sambandi á, at í endaliga skeytinum stendur, at bæði seljarar og keyparar skulu gjalda meklaranum hvør sítt prosent av søluprísinum á 2 milliónir kr. umframt mvg.

- Tá sigur meklarin eisini, at hann umboðar báðar partar.

## Droymi um ein bakaraovn

Unn lyftir lítlu Eyð Lín upp á fangið, og hóast har er trongt, nú búkurin stendur á tambi, er mamman góð at verma seg hjá. Meðan vit hava prátað, hevur Eyð Lín malið runt á gráa linoliumsgólvinum í hvítum dansikjóla, undirtroyggju og berum bibbum, millum køkin, kamarið og stovuna í lítlu loftsíbúðini. Inni í stovuni er ein krókur innrættaður til kontór, ein annar til leikurnar, ein triði til sjónvarpið og tann fjórði til spísiborðið. Og inni í kvistkamarinum fylla fýra sengur alt gólvið: Hjúnasongin í miðjuni við tremmusong og vøggu hvørju megin við. Og í horninum stendur ein brúsikabina úr plasti.

– Tað sum eg droymi um, er eitt ordiligt baðiverilsi, eina stovu og ein køk. Eitt stað til vaskimaskinuna og ein bakarovn. Og so eitt sindur betri pláss, nú vit fáa næsta barnið, sigur Unn og lítur hugsanarsom út gjøgnum vindeygað, áðrenn hon skeinkir sær enn ein kopp av kaffi.

# Ongin viðmerking frá Húsamekling

**Meklaravirkið, sum seldi Unn og Rógva ognina, hevur ongar viðmerkingar til søguna**

BRÚKARAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Meklaravirkið Húsamekling, sum liggur á Vaglinum í Havn, hevur havt allar møguleikar at gera viðmerkingar til søguna um húsakeypið hjá Unn Paturson og Rógva á Rógvi. Virkið fekk greinina longu hósdagin fyrrapart, við freist at koma við sínari útgávu av málinum mánamorgunin kl. 9. Eisini fekk virkið hesar spurningar sendandi, sum vit vildu seta teimum.

Í sambandi við virksemið hjá virkinum, spurdu vit:

*Hvussu er mannagongdin, tá ið tit selja eina ogn?*
*Hvønn umboða tit?*
*Um tit ikki umboða báðar partar, hvussu ber tað so til, at tit avtala at keyparin eisini skal rinda fyri tykkum?*
*Um tit umboða báðar partar, hvussu meta tit, at tað letur seg gera?*
*Í hvønn mun er tykkara húsalýsing bindandi?*
*Í hvønn mun er tykkara frágreiðing um húsini bindandi?*
*Hvussu høgt ganga tit uppí, at tykkara upplýsingar um ognina eru eftirfarandi (hava tit til dømis serkøn fólk at vegleiða tykkum, áðrenn tit úttala tykkum, ella eru tit sjálvi serfrøðingar á økinum)?*
*Hava tit eina ábyrgdartrygging, sum kann taka við, tá illa vil við?*
*Hvørja útbúgving hava starvsfólk tykkara?*
*Hvussu verða starvsfólk tykkara lønt (fáa tey til dømis provisión av hvørjari sølu)?*

Í sambandi við aktuella málið um aspest-húsið hjá Unn og Rógva kundu vit hugsað okkum at virkið svaraði hesum spurningum:

*Hvussu leingi sømir tað seg, at fólk bíða, frá tí, at tey skriva undir fyribilsskeyti til endaliga skeytið verður undirskrivað?*
*Hvør hevur ábyrgdina av ognini í hesum tíðarskeiðinum?*
*Hvussu kunnu tit góðtaka, at tit lýsa við at stykkið er 500 fermetrar, men tá ummatrikuleringin er framd, endar tað við bert at vera 432 fermetrar?*
*Hóast tit vistu, at keyparin ynskti at ógilda keypið, fremja tit tinglýsingina, uttan at boða keyparunum frá. Tit hava tá fingið at vita frá bankanum, at sølukostnaðurin verður goldin, tá tinglýst er. Hví gera tit tað?*
*Hví vildu tit ikki ganga annuleringina á møti?*
*Hvat meta tit, at keyparin gjørdi skeivt?*
*Hvat meta tit, at seljarin gjørdi skeivt?*
*Hvat hava tit lært av hesum málinum?*
*Hvørji ráð vilja tit geva øðrum keyparum?*
*Hvussu hava tit upplivað hetta málið?*

Men sum sagt ynskir virkið ikki at gera viðmerkingar til málið.

